


www.oljan.fo

**Jan Müller** 16 - 02 - 2013

# Statoil grønt ljós til størstu útbygging í Bretlandi

Statoil og samstarvsfeløgini hava fingið grønt lós frá myndugleikunum í Bretlandi at fara undir størstu oljuútbyggingia á bretska landgrunninum seinastu 10 árini. Tað fer at kosta 40 milliardir kr. at byggja út Marinerkelduna, sum liggur 150 fjórðingar eystan fyri Hetland. Framleiðslan av tungu oljuni er sett til at byrja í 2017 og fer at vara í meira enn 30 ár. Árliga framleiðslan verður umleið 55.000 tunnur av olju um dagin. Hetta svarar til 5% av samlaðu framleiðsluni í Bretlandi. Norðsjógvurin er eitt kjarnuøki hjá Statoil, og vit síggja fram til at hava ein leiðandi leiklut við hesi útbygging av bretska partinum av Norðsjónum, sigur Helge Lund, stjóri í Statoil. Ætlanin er at reka Mariner kelduna úr Aberdeen og fer verkætlanin at geva arbeiði til 700 fólk komandi nógvu árini. Marinerkeldan varð funnin í 1981 og goymir millum 300 og 500 mill. tunnur av serstakliga tungari olju.